## DAGSINS MEINING

# Týdningarmikil álit um vinnu og mentan

Dag um dag koma tvey týðandi álit, sum snúgva seg um ávikavist, hvønn mentanarpolitikk og hvønn vinnupolitikk vit eiga at reka. Í seinna førinum er “bara” talan um ein part av vinnupolitikkinum, tann, sum snýr seg um komandi oljuvinnuna.

Í skrivandi løtu hava vit ikki sæð innihaldið í hvørgum av frágreiðingunum, men tað ljóðar, at tað í mentanarálitinum verður lagt upp til størri samstarv millum nettup hesar báðar so týðandi tættir í føroyska samfelagnum, mentanina og vinnuna.

Umrøddu álit eru ætlað sum grundarlag undir orðaskiftum á tingi og sum íkast til almenna kjakið eisini. Lat tað verða sagt her, at blaðið vil leggja ta rúmd, sum er neyðug fyri at lýsa umrøddu álit og at fylgja teimum upp. Tí er tað vón okkara, at lesarar og fólk flest fara at brúka blaðið og gera viðmerkingar til umrøddu álit. Harvið fáa politikararnir eisini ein varhuga av, hvat bylgist í fólki flest, tá tað um mentan og vinnu umrøður.

At hesar frágreiðingar koma samstundis er helst av tilvild, men kanska er tað nettupp lagnunar speisemi, at tær koma nærum í senn, tí tær hava í veruleikanum nakað við hvørja aðra at gera. Og hesum verður sum skilst eisini lagt upp til í mentanarálitinum, har tað verður víst á tann týdning, ið mentan og vinna hava fyri hvørt annað.

Vit hava so eisini eina aktuella støðu beint nú, tá tað snýr seg um nettupp sambandið og samskiftið millum vinnu og mentan. Her hugsa vit um tær mongu milliónirnar, sum oljufeløg hava játtað at lata til førleikamenning. Ávíst kjak hevur tikið seg upp um, hvat hesir pengar eiga at latast til. Higartil hevur so verið valt at lata oljufeløgini sjálvt gera av, hvussu pengarnir koma førleikamenningini best til gangs, og hevur Oljumálastýrið skula góðtikið hetta. Tað er eingin loyna, at Mentamálastýrið kundi hugsað sær at havt ein fingur við í spælinum fyri at tryggja, at pengar frá oljufeløgum til førleikamenning eisini fóru til mentanarførleikamenning. Ella at pengarnir fóru í ein grunn, sum síðani hevði til uppgávu at fordeila pengar til førleikamenning innan bæði vinnu og mentan.

Kanska vit fáa sett hol á hetta kjakið nú í sambandi við umrøddu álit. Um so er at landið ikki er ført fyri at finna neyðugu játtaninar til mentanina, so er rætt at brúka part av pengunum frá oljufeløgunum til hetta økið eisini. Harvið er ikki sagt, at tað ikki skal fara til at førleikamenna okkara vinnulív, so tað er gierað til eina komandi oljuvinnu. Sum er verður nógv eisini latið til útbúgvingar- og granskingaruppgávur, og tað má so eisini sigast at vera partur av mentanina.

Vónandi kunnu umrøddu álit seta gongd á eitt tiltrongt og náttúrligt orðaskifti um, hvussu vit ikki bert menna eina oljuvinnu og stuðla mentanini men hvussu við eisini byggja brýr og menna samstarvið millum hesi bæði so týðandi økini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit eiga at lækka skattin meir!

**Jákup Mikkelsen**



Tá inntøkan fer uppum 150.000 kr., byrja vit at gjalda umleið 60 oyru av hvørjari krónu í skatti og tað líkist ongum. At gjalda so nógvan skatt tekur arbeiðshugin frá fólki. Hetta er beinleiðis orsøkin til, at fólk veruliga kenna tað soleiðis at tað ikki loysir seg at arbeiða yvirtíð.

Arbeiðið er til allar hendur og væl tað. Vit innflyta arbeiðsmegi, men gera tað lítið meiningsfult fyri okkara egna fólk at arbeiða meir, tí tey verða dýkt undir í skatti.

Tí er tað neyðugt at lækka skattin, serliga hjá lág og meðalinntøkunum, sum frammanundan hava tær tyngstu byrðarnar at bera.

At Tjóðveldisflokkurin er firtin um uppskot Fólkaflokksins um skattalætta, skilji eg væl. Men Kartin Hansen, fíggjarmálaráðharri og Tjóðveldisflokkurin kunnu takka sær sjálvum fyri at Fólkaflokkurin legði hetta uppskot fram. Ferð eftir ferð hevur Fólkaflokkurin heitt á Fíggjarmálaráðharran um at koma við einum uppskoti um skattalætta, men tala hevur verið fyri deyvum oyrum.

Fyri stuttari tíð síðan løgdu Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin uppskot fram um skattalætta — ógvuliga líkt tí Fólkaflokkurin nú hevur lagt fram. Spell at hesir flokkar nú bakka og skíra uppskotið óseriøst tí tað er so tætt upp undir val. Fyri skattgjaldarin er ein skattalætti kærkomin um tað er beint áðrenn eitt val ella beint aftaná.

**Javnaður, Tjóðveldi og Samband ímóti lág og meðalinntøkunum?**

Tann stóri spurningurin er nú um Javnarðarflokkurin og Tjóðveldisflokkurin saman við Sambandsflokkinum fara at atkvøða ímóti at tey lágløntu og meðalinntøkurnar skulu fáa skattalætta. Spennandi verður at fylgja við, tá atkvøtt verður í Tinginum um stutta tíð.

# Framtíðar Føroya Tele

**Olav Enomoto**
*Valevni Sambandsfloksins í Norðurstreymoy*
*www.olav-enomoto.com*



Umrøðan ta seinastu tíðina um privatisering av Føroya Tele (FT) er blivin meira kompliserað, heldur enn foreinklað.

Eg vil hervið geva mítt boð uppá, hvussu vit kunnu fáa eina veruliga byrjan og javnbjóðis kapping á samskiftisøkinum, ið javnsetir allar veitarar á økinum, eisini komandi veitarar.

Persónliga gangi eg inn fyri at privatisera FT, men hetta eigur ikki at vera gjørt, einans tí at nakrar krónur kunnu vera at vinna við søluni. Fremsta endamálið við privatiseringini eigur sjálvsagt at vera, at vit kunnu garantera brúkaranum, tí einstaka føroyinginum á øllum oyggjunum, eina líka góða og helst betri veiting og tænastu, enn hana vit fáa í dag.

**Telesamskifti í dag**

Sum kunnugt er FT í dag eitt alment partafelag, ið bæði veitir tænastu til Føroya fólk (telefon, fartelefon, internet o.a.), og sum samstundis viðlíkaheldur og leigar út samskiftisútgerð (kaðalar og aðra sendiútgerð) til aðrar televeitarar — og til sín sjálvs!

Uppgávan hjá FT hevur ikki eydnast so væl vegna tær dupultrollir, FT hevur orsaka av ábyrgdarskyldu síni. Hetta hevur ført við sær, at aðrir veitarar, sum Kall, kenna seg við sviðið soð og hava inndrigið Fjarskiftiseftirlitið í kjakið um javnbjóðis kapping millum tveir/fleiri veitarar.

**Telesamskifti í framtíðini**

Tað ber ikki til at privatisera alt FT, sum vit kenna tað í dag. Neyðugt er at splitta FT upp í tvey feløg, nevniliga í privata felagið (FT Tænasta), ið veitir samskifti so sum Kall ger í dag, og almenna í felagið (Føroya Samskiftisútgerð), ið rekur og umsitur samskiftisútgerðina. Tað ber ikki til, at eitt privat felag fær loyvi til bæði at umsita ta útgerð, ið allir veitarar skulu brúka, og samstundis fær loyvi til at selja tænastur til fólkið. Neyðugt er við einari greiðari skiljing ímillum samskiftisútgerðina og tænastuna.

Kall eigur ikki at føla seg minni verdan enn Føroya Tele, og Fjarskiftiseftirlitið eigur ikki at vera ein meglari millum tveir veitarar. Og ei heldur vera skuldsettir fyri at renna ørindi fyri ein ella fleiri samskiftisveitarar.

Idealið og politiska ynski er, at FT og aðrir veitarir, so sum Kall, verða javnsettir.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Sjálvmál

**Dánjal á Dul Jacobsen**



Nei Eyðólv, eftir eitt so klárt og týðiligt sjálvmál var ikki neyðugt at skýra teg nakað sum helst. Og tú ert í ferð við at skora tað næsta við.

Um tað fer at ganga, sum tú væntar viðvíkjandi skúlunum hjá Lívsins Orð í Svøríki, so sigur tað ikki so nógv um Lívsins Orð sum um javnaðarstýrda Svøríki. Tað er ikki bert í Svøríki javnaðarpolitikkur hevur staðið kristnum fRískúlum ímóti. Eisini í Noregi leikaði hart á, tá javnaðarministarin í skúlamálum Trond Giske gekk í móti umsóknini hjá eini kristnari samkomu, sum søkti loyvi at byrja fRískúla. Sjálvt tá Stórtingið við greiðum meiriluta hevði álagt honum at viðgera umsóknina javnbjóðis øllum øðrum umsóknum vildi hann ikki lata demokratiið ráða. Hetta hóast hann frammanundan greitt hevði sagt, at hann fór at fylgja meirilutanum í Stórtinginum. Stórtingið í Noregi hevur ein eftiransandi myndugleika sum teir nevna ”Stortingets kontroll- og konstitusjonskomite” Hesin myndugleiki skal millum annað ansa eftir, at stjórnin fremur viðtøkurnar sum Stórtingið hevur viðtikið, og tá Giske ikki hevði gjørt, sum honum var álagt, mátti hann finna seg í at vera verbalt avhølvaður í tinginum, tá Stortingets kontroll- og konstitusjonskomite legði máli um hansara fólkaræðisliga ólýdni fram. Til alla lukku fyri samkomuna, sum søkti, kom javnaðarflokkurin ikki í stjórn aftur eftir valið. Tað gekk ikki long tíð, til ætlaði skúlin byrjaði. Nóg mikið um hetta.

Tað sum her heima hjá okkum hevur áhuga er um javnaðarflokkurin stendur aftanfyri títt væntandi frælslyndi, tolsemi, javnvirði og fólkaræði. Hetta fæst vónandi at vita í tíðini, sum eftir er til valið.

Annars kann eg ugga teg við, at eg hvørki ætli mær býráðs- ella løgtingssess, sjálvt um eg havi júst líka góðan rætta til at fiska eftir tí sum tú, men eg kann veita nøkurlunda vissu fyri, at tað koma fleiri viðmerkingar um neyðugt.

At enda: Ákærur tínar móti Lívsins Orð, at teir læra, at fólk sum gerast sjúk av kreft eru straffaði av Gudi, eigur tú sum minsta sømuliga mark at prógva.

# Sosialurin nýggja deild í Saltangará

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður*



Eg vil á henda hátt nýta høvi til at ynskja tíðindablaðnum Sosialinum og starvsfólkunum á blaðnum hjartaliga vælkomin inn á Skálafjørðin. Við hesum seinasta tiltakinum at verða meira sjónligir uttan fyri høvuðstaðin, hava tit víðkað virksemið til eisini at opna eina skrivstovu í Saltangará. Tit hava við hesum stigi víst áræði og dirvi, nú summi bløð hava hug at repa seglini. Eg eri fullvísur í, at hetta tiltakið gevur eysturoyingum eina kenslu av, at Sosialurin nú í størri mun er okkara blað. Við nýggju deildini hava tit betri møguleikarl at fylgja við í nærumhvørvinum her og kunna vera fyrstir við tí síðsta nýggja, sum hendir í hesum partinum av Føroyum.

Eg vóni, sum Jan Muller blaðstjóri eisini segði tað við hugnaligu móttøkuna í nýggju hølunum, at vinnulívið og fyritøkur í oynni fara at taka væl undir við hesum framstigi og í størri mun enn higartil stuðla blaðnum við lýsingum, samstundis sum haldaraskarin veksur, tí alt skal fíggjarliga hanga saman.

Eg trúgvi, at Sosialurin er komin fyri at vera.

Vónandi fer okkurt annað blað ella loftborin miðil at taka táttin upp og fylgja blaðnum eftir, tit skulu eisini vera vælkomnir.

Enn einaferð tøkk og góða eydnu.

# Amboðskassin

**Heðin Mortensen**
*løgtingsmaður*



Høgni Hoydal eigur stóra takk uppiborna fyri amboðskassan, sum hann gav okkum. Hvítabók, grundlógararbeiði, samráðingar við danir, felagslýsingin hjá Fogh og løgmanni, alt hetta hevur gjørt, at fleiri amboð eru at brúka til at byggja land komandi valskeið.

Amboðskassin hjá Høgna manglaði tó nøkur amboð. Har vóru ov nógv teoretisk amboð, passarar, vinkulmátarar og farvukort. Og so noktaði Høgni at brúka summi amboð, serliga eitt ávíst reyðligt jarnbrot.

Høgni og hansara menn manglaðu eisini handalag. Tó at teir høvdu slitið mangan skúlabonkin, og vistu alt, hvat bøkurnar søgdu um at byggja land, so var ikki so lætt at fáa alt at sita. Nørdanevndirnar og heppikór hjálptu øgiligt uppá stemningin, men lítið uppá arbeiðslagið.

Eygamál vantaði, so berandi veggirnir gjørdust ov skeivir. At teir hóvsomu, ið heldur byggja stig fyri stig, ikki sluppu uppí part, hjálpti heldur ikki júst uppá avrikið.

Og dog. Amboðskassin og allar tær útrokningar, tekningar og tabellir, sum í honum liggja, fara at koma væl við hjá okkum næsta valskeið. Tí vit fara til verka at byggja land eftir tann 30. apríl.

Vit skulu hava eina nýggja evstulóg, um vit so kalla hana stýriskipanarlóg ella grundlóg.

Vit skulu hava eina nýggja avtalu við danir, um hon so eitur heimastýrislóg ella sjálvstýrislóg.

Tað er ein sannroynd, at sambandsíðan í tinginum fyrr bara var ímóti. Tað er tíbetur ein farin tíð, nú fara vit til verka við amboðunum hjá Høgna. Tá tey, ið duga at halda á einum hamara sleppa framat, man tað fara at líkjast.

# Greiða stevnu fyri almannapolitikkin

**Jógvan Arge**
*Valevni tjóðveldisfloksins í Suðurstreymi*



Í tí týdningarmikla almannaverkinum eru stórar uppgávur at loysa. Skal tað virka væl, er neyðugt at gera ein yvirskipaðan politikk við greiðum endamálum.

Almannalóggávan er ikki júst skorin eftir føroyskum leisti. Í mongum førum er hon heldur ikki vorðin til eftir viðgerð og orðaskifti millum fólk í Føroyum.

Hon er eitt regluverk, sum lutvíst er innflutt í smáum bitum, ið upprunaliga høvdu eitt annað samfelag við øðrum viðurskiftum og fortreytum til fyrimynd.

Tí er lóggávan í Føroyum ring at finna samanhang í. Hon er eisini trupul at umsita, ja, so mikið trupul, at tað skjótt kann ganga út yvir tey, sum hon er gjørd til at hjálpa.

**Hálvar loysnir av samvitskubiti**

Fólk í almannaverkinum hava dag og dagliga ilt við at finna útav, hvar ábyrgdir og heimildir liggja, og vit hava fingið hitt sigandi hugtakið samvitskuútsreiðslur inn í orðaskiftið um almanna- og heilsumálini.

Til dømis hava kommunurnar ikki fingið ábyrgdina av eldraøkinum enn. Tað hevur við sær, at mangt og hvat á hesum øki dettur niðurímillum.

Kortini kenna kommunurnar ábyrgd fyri sínum borgarum, og tí átaka tær sær av samvitskugrundum ávísar útreiðslur, sum tær í roynd og veru ikki eiga part í. Men hetta verða ongantíð annað enn hálvar og kvartar loysnir.

Viðurskiftini hjá teimum brekaðu og teirra avvarandi eru ikki nóg góð, og lóggávan er fløkt. Summi fáa tilboð um hjálp, onnur fáa ikki.

Ongin sigst hava ábyrgdina av at greiða frá teimum tilboðum, sum eru, og tí verða tað stundum bara tey, sum orka at stríðast við myndugleikarnar, ið fáa hjálpina, sum tilkemur øllum í somu umstøðum.

**Lógarverkið takast í botn**

Útreiðslurnar av almannalóggávuni fylla triðingin av føroysku fíggjarlógini, so neyðugt er at hava greið endamál við henni og greiðar reglur í henni.

Hyggjuráðini eru sum frálíður at taka alla hesa lóggávuna í botn við tí endamáli at tryggja gjøgnumskygni og fáa samsvar millum lóggávu og umsiting.

Høvuðssetningurin er at tryggja landsins eldri og brekaðu sømiligt lív, samstundis sum teimum, ið koma fyri vanlagnu á lívsleiðini, verða tryggjaðar sømiligar umstøður.

Ein greið stevna í almannamálum er eitt av boðum tjóðveldisfloksins upp á framtíðina.

# Fakfelags undirgravandi virksemi

**Hans Birgir Hansen**

Tað er nakað grundleggjandi skeivt, tá tímaløntu og mánaðarløntu lønmóttakarar ikki halda seg innan egnu fakmørk, ið bróta fakfelags lógargreinar við meira.

Tað er her, at hópin av lønmóttakarum langt síðani eru farnir tvørtur um øll fakmørk við fleiri hjáarbeiðum, ein áður hevur funnist harðliga at í fleiri lesarabrøvum.

Tað er brot á fakfelagsins lógargreinar, tá ið eingin hevur loyvi til at vera óheftur/heftur at fleiri fakfeløgum, og undirgrava tær sáttmálabundnu fakfelags lønir.

Tað er veruliga fakfelagsstøðan, ið ein ikki góðtekur, at mánaðarløntu hava tímalønt og tímaløntu undirlønt hjáarbeiðir við síðuna av tí, ið hesi hava fæst ídag.

Tað skal verða funnist harðliga at fakfelags forkvinnum–/monnum, taka hesi ikki eitt annað skinn um bak, og fáa fakfelagslimir at gevast við hjáarbeiðum.

Tað kann ikki góðtakast, at vit hava bíliga og undirlønta arbeiðsmegi, sum liggur niðan fyri tær sáttmálabundnu fakfelags lønir, vit hava um alt landi og í Havn.

Tað er einki gjørt av fakfelags forkvinnum–/monnum fyri at tryggja, at vanligu arbeiðsmenn–/kvinnur og sjálvstøðugt vinnurekandi hava livibreyð.

Tað skal, í lesarabrøvum, verða funnist harðliga at tí ruðuleika, ið valdar hjá flutningsfyritøkum, tá ið fleiri eru komin inná økið hjá H.A.F.

Eg havi eitt hjarta í bankar fyri vanliga verkafólkinum arbeiðsmonnum/–kvinnum/sjálvstøðugt vinnurekandi í Havnini/Suðurstreymoy.

Tað skulu øll gera sær greitt, at ein vil hava steðga ruðuleikum, ið skapa kappingaravlagan, í fakfeløgum og flutnings fyritøkum.

Hetta fer ein at kom aftur til í lesarabrøvum og á fundum, tá ið ein ger vart við seg.